# Fundarfrágreiðing til HSF-limafundi mánadagin 2. feb. 2026

Luttakandi: Gunn Ellefsen, Heini Ellingsgaard, Durita Thomsen, Birgir Kass og Høgni Vilhelmsen fyri Starvsnevndina. Ann-Mari Wang fyri Menningar- og Úrvalsnevndina. Ári Rouch, Pól Hendrikkur Andreassen, Hallur Danielsen, Mark Lausen-Marcher, Jens á Skipagøtu og Andrass Thomsen fyri umsitingina. Bjørg Patursson og Eyð Hansen fyri VÍF. Pætur Jakobsen fyri Neistan. Annika Arge fyri Stjørnuna. Eyðun Mortensen, Heini Hellisdal Poulsen og Tomma Petersen fyri Kyndil. Anna Dam, Emy Sólvitsdóttir og Petur Skeel Dahl fyri H71. Helgi Simonsen fyri SÍF/Søljuna. Áki Ellendersen fyri ÍA. Karstin í Húsinum og Magnus Jacobsen fyri KÍF. Sunnuvá Eysturdal og Andrea Dahl fyri EB. Egi Danielsen og Ann Berg Danielsen fyri StÍF. Jón Jacobsen fyri Team Klaksvík. Tóki Krosslá Mortensen fyri VB.

Andrass Thomsen, stjóri, beyð vælkomin og gjøgnumgekk skránna.

**1.0 Framløga frá Spiideo um videoskipan**
Andrass greiddi frá støðuni við live.hsf.fo, har veitarin hevur sagt sáttmámlan upp. HSF hevur leitað eftir nýggjari loysn og er valið fallið á Spiideo, sum íslendingar hava góðar royndir við. Talan er um sjálvvirkandi kameraskipan, sum ikki tøvari kamerafólk. Daniel, umboð fyri Spiideo, greiddi frá yvir teams, hetta hvussu skipanin virkar og verður brúkt.

**1.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningina gætur, og var semja um at HSF skal arbeiða víðari við loysnini og seta upp fyrstu royndarkamera´ini skjótast.

**2.0 Kunning ísv. Faxa Kondi steypafinalurnar 2026**
Nicholas Satchwell greiddi frá í mun til steypafinalurnar, herundir alt sum hevur við feløgini at gera. Upplýsingar í mun til steypafinalublaðið, áskoðarar, atgongumerkir, kiosk, vaktarhald, skilhald v.m.

**2.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunning gætur.

**3.0 Kunning um temadagar í apríl**
Ári Rouch greiddi frá temadøgum, sum vera í apríl. Temadagarnir skulu viðgera alt sum hevur við heimligu kappingina at gera. U8, U9, U10 verður viðgjørt saman, U12, U14 og U16 saman og U18, 1. deild og fremstu deildir saman. Feløgini eru vælkomin at seta fram ynski um evni at hava á skrá, og kemur Andrass at senda ein innkalling út.

**3.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunning gætur.

**4.0 Uppskot um leikdagar í Burn og SMS í 2026/2027**
Ári Rouch tók kappingarálmanakkan fram. Hetta var í mun til uppskotið, sum var á undanfarnað limafundi, har tað var viðgjørt, hvør besta mansdeildin skuldi spæla dystir, tvs. fýra umfør, heldur enn trý, áðrenn endaspælið. Talan blívur við broytingini um fleiri miðvikudystir, men hinvegin færri “hol” í kappingini. Tað er ein møguleiki, at tað verða 8 lið í bestu mansdeildini komandi kappingarár og vil hetta eisini viðføra fleiri

dystin og tætta holin

**4.1 Niðurstøða**
Kappingarnevnd og kappingarleiðslan fylgja við støðuni til næsta limafund og møguleikanum fyri einum broytingaruppskotið.

**5.0 Skipan av kappingum ísv. luttøku hjá A-landsliðnum til EM og HM endaspæl**
Ári Rouch kunnaði um avbjóðingarnar við at leggja kappingina, tá bæði mans- og kvinnulandsliðini spæla endaspøl í desember og januar. Hvussu nógv og í hvønn mun skulu kappingar liggja stillar í mun til hetta, eisini tá liðini vinna seg víðari úr bólkaspælinum.

**5.1 Niðurstøða**
Kjak var um avbjóðingina og feløgini góvu kuningini gætur, men eingin niðurstøða

**6.0 Mannagongd viðv. avlýsing vegna veður**
Ári Rouch tók fram mannagongina, sum er galdandi, tá talan er um ivasamt veður í mun til ferðing til og frá dystum. Umsitingin kannar veðurlíkindini, tá tey eru ivasom, herundir almennu síðurnar hjá Landsveriki og SSL. Eisini kann kappingarleiðslar taka samband við lokal fyri at frætta um støðuna. Tað er avgerandi, at tað er kappingarleiðslan, sum hevur endaliga orðið í mun til møguligar avlýsingar, ikki feløgini ella foreldur.

**6.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kuningini gætur.

**7.0 Dómaraseðlar**
Ári Rouch vísti á, at tað vóru ov nógvir dómaraseðlar, sum ikki vóru fullfýggjaðar og rætt útfyltir. Tað er týndningarmikið at feløgini, venjarar og ábyrgdarfólk gera sær ómak, møguleiki er eisini fyri at gera hetta heimanífrá, tað snýr seg um góðar rutinur. Dómaraseðilin kann hava týdning í mun til kappingarmál, agamál og er eisini eitt søguligt skjal, sum kann hava týdning fyri eftirtíðina, søgu, kanningar o.a.

**7.1 Niðurstøða**
Semja var um at tað mátti strammast upp á økinum.

**8.0 Player releasing fee**
Andrass Thomsen greiddi frá, at tá landsliðini eru til endaspøl, fellur eitt sonevnt player releasing fee til feløgini, har leikararnir hoyra heim. Talan er um gjald, sum IHF/EHF letur til feløgini fyri tað tíðarskeiðið teir eru burtur frá feløgunum. HSF ynskir at gera vart við hetta yvirfyri feløgunum, hetta serliga í mun til viðurskiftini millum leikarar og feløgini, tá samstarv og sáttmálar skulu viðgerðast. Teir leikarar, sum ikki hava sáttmála, eru leingi burtur frá heimi arbeiði og kann umhugsast, at gjaldið í hesum førðinum fellur til leikaran. Hetta má avtalast millum felag og leikara.

**8.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur

**9.0 Atburður hjá áskoðarum, venjarum, leikarum o.ø.**

Andrass Thomsen minti feløgini á, at feløgini skulu mugu vanda sær um atburðin hjá áskoðarum, venjarum og leikarum yvirfyri dómarum.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur

**10.0 Tá gleðin hvørvur, framløga Helga Hoydal um fráfall hjá gentum**
Helgi Hoydal hevði framløgu av kanning, sum hann hevur gjørt í sambandi við praktikktíð hansara í HSF. Kanningin vísir á viðurskifti, sum gera seg galdandi, tá gentur gevast at spæla hondbólt í tannárunum.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunniningini gætur og var áhugavert kjak um evni.

**11.0 Ymiskt**
Andrass kunnaði Ítróttafagnaðin hjá ÍSF, har feløgini eisini kunnu luttaka. Gallaveitslan hjá HSF verður í mai, og kunnu feløg bjóða seg fram at skipa fyri hesari. Andrass kunnaði eisini um at stuðlatiltakið hjá HSF í sambandi við landsdystir í løtuni er avmarkað orsakað av brandviðurskiftunum í hølunum ið Tjarnir. Tískil eru bara forfólkini í feløgunum boðin við. Arbeitt verður tó víð at fáa eina loysn uppá avmarkingarnar.

**9.1 Niðurstøða**
Feløgini góvu kunningini gætur.

**Fundarskrivari:**
Ári Rouch